deildin

# Kappingin við Løkin er stór

**Nes Sóknar Ítróttafelag**
**FO-620 Runavík**
**www.nsi.fo**

**STOVNAÐ**
**24.03.1957**

**FORMAÐUR**
**Andrias Lamhauge**

**MEISTARAR (1)**
**2007**

**STEYPAVINNARAR (2)**
**1986 og 2002**

**GREIPUVINNARAR**
**Ongantíð**

**Í BESTU DEILDINI**
**(23 ár)**
**1976, 1979, 1984-1988, 1991-1992, 1994-1995, 1997-**

**Í EUROPA (4)**
**Champions Leage**
**2008/09**
**UEFA Cup 2003/04, 2005/06, 2007/08**
**Intertoto 2004/05**



**Takið hjá nýggja venjaranum verður at fáa FM kandidat burtur úr tilfeinginum, sum tykist vera betri enn so nógva aðra staðni**

Miðvallargeneralurin, Nenad Stankovic, er burtur, og burtursæð frá Potemkin, sum framvegis er ætlaður til fremstu álopsódnina, so eru allir hinir útlendingarnir farnir.

NSÍ hevur eisini skift venjara. Pauli Poulsen, sum á Skála og síðani í Runavík stóð í læru hjá Johan Nielsen, heldur nú um stýrisvølin. Hóast talan hevur verið um fleiri markantar útskiftingar, so kunnu 2007 meistararnir, sum í fjør vóru eitt stig ov stuttir til 3. plássið, ikki renna undan, at teir eru betur fyri, enn fleiri av hinum eru tað.

Tað er stór kapping um plássini. Fýra nýggir spælarar, sum ikki eru komnir at hita beinkin, skulu spælast inn á liðið, og tað kann væl vera, at tað fer at eydnast at finna fram til góða loysn.

Venjarin er áhugaður í uppstillingini, sum fer at megna bestu avrikini og harvið størstu úrtøkuna. Talan kann gerast um tvíeggjað svørð, tí um liðið fer at verða mannað við fleiri, sum eru uppaldir aðra staðni, enn tað fer at verða mannað við evnaríkum dreingjum, ið eru uppvaksnir í felagnum, so er møguleiki fyri, at ótolnu ungu menninir fara at leita aðra staðni fyri at sleppa framat.

Meinhard Joensen fer at verja málið. At tríggir av verjuspælarunum seinasta árið hava verið á ella í nánd av landsliðnum boðar frá høgum støði. Fjórði verjuspælarin fer kanska at verða Jónhard Frederiksberg, sum áður hevur verið fremri á vøllinum – bæði á Skála og í NSÍ.

Høgni Madsen úr Fuglafirði og Jann Ingi Petersen úr B68 eru keyptir til Runavíkar fyri at styrkja um sentrala miðvøllin. Tíðliga í vetur varð Jann Ingi skaddur í knænum. Tað hevur darvað honum í at venja saman við nýggju liðfeløgunum.

Bogi Løkin er sjálvskrivaður, og Jústinus R. Hansen, sum eftir steðg í fjør er komin aftur í barndómsfelagið, tykist saman við Hjalgrími Elttør og Karoly Potemkin at vera gott boð upp á pláss millum teir fyrstu ellivu.

Men spurningurin er eisini, hvussu tað fer at hilnast hjá evnaríku og nærløgdu ungu monnunum. Millum hesar eru Jens Joensen, Filip Jacobsen, Monrad Jacobsen, Jann Martin Mortensen, Klæmint A. Olsen og Øssur Dalbúð. Teir vilja allir heldur renna á vøllinum enn at sita á beinkinum. Um tað eydnast teimum at vinna sær pláss millum teir fremstu ellivu, so verður tað onkur annar, ið hevði átt pláss millum teir fyrstu ellivu í so at siga næstan øllum hinum feløgunum, sum fer at sita á bonkarendanum.




Eftir heiðurin sum ársins stjørnuskot í fyrraárið mentist Bogi Løkin í fjør til ein tann besta spælaran í føroyskum fótbólti. Og heilt víst verður hann ein av týdningarmestu spælarunum, um NSÍ aftur skal leita sær móti tindunum í ár

Mynd: Álvur Haraldsen

## Hópurin hjá NSÍ :

**MÁLVERJAR:**
Meinhardt Joensen (Áður spælt við KÍ, GÍ, B68, B36)
Kristian Joensen

**VERJA:**
Óli Hansen
Johan Troest Davidsen (Everton)
Einar Hansen
Monrad Jacobsen
Jens Joensen

**MIÐVØLLUR:**
Høgni Madsen (ÍF, KÍ)
Jann Ingi Petersen (B68, Fremad Amager)
Jann Martin Mortensen
Bogi Løkin
Jústines R. Hansen
Sjúrður Jacobsen
Filip Jacobsen

**ÁLOP:**
Øssur Dalbúð
Karoly Potemkin (EB/S, B36)
Jónhard Frederiksberg (Skála)
Hjalgrím Elttør (KÍ, Fremad Amager)
Klæmint Olsen

**VENJARI:**
Pauli Poulsen

**HJÁLPARVENJARI:**
Anton Skoradal

**TILGONGD:**
Jann Ingi Petersen, B68
Høgni Madsen, ÍF
Jann Martin Mortensen, B68
Jónhard Frederiksberg, Skála
Meinhardt Joensen, B36

**FRÁGONGD:**
Pól Jóhannus Justinussen, B68
Tórður Thomsen, leysgivin
Jónas Þór Næs, leysgivin
Milan Pejcic, 07 Vestur
Aco Pandurovic, FK Sumadija
Dejan Stojkovic, FK Radnicki
Nenad Stankovic, B68